## Brúka pápafarloyvið

Týskir menn eru eftir øllum at døma fegnir um lógarbroytingina, sum gevur teimum møguleikar at taka farloyvi í sambandi við barnsburð - tað sokallaða pápafarloyvið. Í hvussu er vísir ein uppgerð hjá myndugleikunum, at 18,5 prosent av pápunum velja at fara í farloyvi. Lógin gevur teimum tveir triðingar av lønini í farloyvistíðini. Endamálið við lógini er at fáa týskarar at fáa sær fleiri børn, og sambært myndugleikunum virkar lógin eftir ætlan.




## Nógv færri húsalán

Íslendsku bankarnir eru ikki so hugaðir at læna fólki pengar til húsa- og íbúðarkeyp longur. Ein uppgerð hjá landsbankanum vísir, at fýra teir fyrstu mánaðirnar vóru húsa- og íbúðarlánini hjá bankunum 37 prosent minni enn somu mánaðir í fjør. Hinvegin økjast lánini úr tí almenna húsalánsgrunninum. Fýra teir fyrstu mánaðirnar í 2007 átti grunnurin 56 prosent av øllum húsa- og íbúðarlánunum. Í ár er partur hansara 80 prosent.

# Tunlar skulu bjarga miðbýnum í Havn



**Eitt netverk av tunlum undir jørð skal halda bilum burtur frá miðbýnum, so tað gerst tryggari og hugnaligari hjá fólki at ferðast í gøtunum, hildu fleiri á kjakfundi um miðbýin fyrr í vikuni**

KJAKFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Eg eri illa lýdd millum bilførarar í býnum, tí eg gangi og sløkki bilar, sum standa í tomgongd.

Dáman, sum hevði tikið sakina í egnar hendur, var ikki tann einasta á kjakfundinum mánakvøldið um miðbýin, sum hevði sæð seg illa inn á mongu bilarnar í miðbýnum í Havn.

Tí fall tað eisini í góða jørð á fundinum, tá ein skjeyt upp, at skipa eitt netverk av tunlum undir býnum, so at bilarnir ikki longur skúgva bæði fólk og lív á gøtunum burtur. Eisini borgarstjórin, Heðin Mortensen, vísti á, at býráðið við jøvnum millumbilum hevur arbeitt við ætlanum um slíkar tunlar.

### Tunlar og brýr

Í Føroyum er tað eftir øllum at døma soleiðis, at roynir tú at halda bilunum burtur, so hvørva fólkini eisini. Tí nyttar tað lítið at geva fólki boð um at parkera bilin uttanfyri Havnina og vænta, at tey taka ein av ókeypis bussunum inn í miðbýin, gjørdi ein av luttakararnum á kjakfundinum vart við.

Hetta nýtist tó ikki at merkja tað sama sum, at bilarnir áhaldandi skulu spæla høvuðsleiklutin inni í miðbýnum, vísti ein annanr luttakari á. Við at gera eina tunnilsskipan undir jørð við uppgongdum ymsastaðni í miðbýnum, kunnu fólk framvegis koma tætt at teimum støðum, har tey hava ørindi ella hug at savnast, samstundis sum bilurin er í nánd eitt nú í einum parkeringskjallara nær við.

Eisini borgarstjórin, Heðin Mortensen, helt hugskotið vera vert at arbeiða víðari við. Sambært honum hava tankar longu verið frammi í býráðnum um at binda eystaru- og vestaruvág saman við einum tunli undir jørð.

Hugskotið um tunlar undir jørð fekk rættiliga ferð á kjakið. Afturat uppgongdunum til ávís støð í miðbýnum, áttu at verið brýr millum tær gøturnar, har flestu handlar og fólk halda til, skeyt ein av luttakaranum upp. Hetta er heilt vanligt í øðrum býum, og síggja slíkar skipanir út til at rigga heilt væl.

### Drepandi nostalgi

Á tí meir filsosofiska bógvinum vildi ein av luttakarnum á fundinum vera við, at nostalgiskar og romantiskar ímyndir av miðbýnum eru ein tann stórsta forðingin fyri at skapa nýtt lív í býnum.

Okkurt ruggar í hvussu er ikki rætt, tá øll siga seg vera so ómetaliga góð við miðbýin, alt meðan býurin spakuliga doyr. Ongin sigur seg vera góðan við SMS. Kortini er SMS ju á tremur av fólki og virksemi allan dagin ígjøgnum.

*- Okkurt ruggar ikki rætt, tá øll siga seg vera so sera góð við miðbýin, alt meðan býurin spakuliga doyr, helt Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri í Havn*

Onkur vísti á, at ivaleyst er føroyska verðurlagið ein partur av orsøkini. Tað fáa vit hinvegin ikki gjørt so øgiliga nógv við. Skal Havnin aftur sjóða av lívi og yðja við fólki, mugu vit sum eitt tað fyrsta fáa ungdómin inn í býin. Tað krevur, at vit hugsa heilt av nýggjum, eitt nú tá tað ræður um at byggja skúlar. So í staðin fyri at parkera allan ungdómin í einum skúla úti á Marknagilsvegnum, hví so ikki fjerna til dømis Skipasmiðjuna og skapa eitt blómandi skúlaumhvørvi har? Vit nýtast ikki at uppfinna tann djúpa tallerkin av nýggjum. Alla aðrastaðni síggja vit, at tað fyrst og fremst er ungdómurin, sum heldur lív í kaféunum og lívinum á gøtunum. Er tað tað, vit vilja hava, mugu vit eisini vera sinnað at broyta býin, so at ungdómurin hevur eina orsøk til at vera í honum – eisini vanligar gerandisdagar.

### Borgarahús

Ein av ungu luttakaranum á fundinum var skjót at lofta hugskotinum um fleiri tilboð til ung í miðbýnum í dagtímunum. Hon vísti á, at tað kann ikki vera rætt, at hevur tú hug at dansa, ert tú tvungin at gera tað um náttina millum fullar menn. Tað átti ikki at verið so trupult at fingið eitt høli til vega, har fólk til dømis kundu dansa salsa og fingu dansifrálæru gerandisdagar.

Júst til slík endamál átti Havnin at havt eitt borgarahús, skeyt ein onnur kvinna upp, sum helt tað vera stórt spell, at gamla Apotekið ikki verður brúkt betri. Hon dugdi illa at ímynda sær eitt betri stað, enn júst gamla Apotekið, har fólk í øllum aldri kundi savnast um ymiskt virksemi.



*Hugskotið um at skipa eitt netverk av tunlum undir miðbýnum fekk av álvara ferð á kjakið í Miðlahúsnum um miðbýin fyrr í vikuni*

Í sama andadrátti skeyt onkur upp, at Løgtingið flutti út úr býnum, so bæði bygningur og økið kring um í størri mun bleiv karmur um eina livandi býarmentan.

### Bygdabilar ein trupulleiki

Inn imllum mongu hugskotini vendi kjakið javnan aftur til parkeringstrupulleikarnar í býnum. Onkur vildi vera við, at trupulleikarnir í stóran mun standast av bygdafólkum, sum arbeiða í Havn og lata bilarnar standar parkeraðar í miðbýnum allan dagin á tamb ja enntá í fleiri dagar.

- Avbygdafólk skulu vera hjartaliga vælkomin til Havnar. Men tað kann ikki vera meiningin, at hendan langtíðarparkeringin skal forða fólki, sum hava eini skjót ørindi í býnum, at sleppa av við bilin eina løtu, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Tí meinti hann, at kommunan sum eitt tað fyrsta eigur at áseta, at stór øki í býnum, sum til dømis Skálatrøð, bert skulu nýtast til stutttíðarparkering.



*- Avbygdafólk skulu vera hjartaliga vælkomin til Havnar. Men langtíðarparkeraðir bygdabilar eiga ikki at gerast ein forðing fyri, at fólk kunnu gera sær skjót ørindi í býnum, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn*